# Reglur fyri útlutan av íbúðum

## Slag av ogn

1. Tá ið Tórshavnar kommuna bjóðar út øki til íbúðarbygging, kann kommunan gera av, at íbúðirnar skulu lutast út sambært lutakasti, sum kommunan skipar fyri.

## Tilmelding

2. Tá ið klárt er at luta íbúðirnar út, boðar Tórshavnar kommuna frá hesum í fjølmiðlum og á kommunalu heimasíðuni.

   Ásett verður freist á í minsta lagi fýra vikur, har til ber at melda til lutakast um íbúðirnar. Hjúnafelagar og makar telja sum ein og sama tilmelding.

   Tilmeldingin fer fram í sjálvgreiðsluni á kommunalu heimasíðuni. Við tilmeldingini skal vera váttan frá peningastovni um, at fígging er tøk.

   Er talan um fleiri støddir ella sløg av íbúðum, kann skipast soleiðis fyri, at tá ið ein meldar til, skal ein raðfesta millum ymsu støddirnar ella sløgini. Ein kann tó ikki raðfesta íbúðir, sum kosta meira enn tað, sum váttanin um fígging røkkur til.

## Treytir

3. Treytirnar fyri at melda til og fáa tillutað eina íbúð eru hesar:
   a) Ein skal vera fylt/ur 18 ár
   b) Ein, ella hjúnafelagi/maki, skal ikki beinleiðis ella óbeinleiðis, til dømis saman við øðrum, gjøgnum partafelag ella á annan hátt, eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til privatan bústað. Hetta er tó ikki galdandi, um ein bara eigur íbúð í kommununi, og tað er har, ein er skrásettur at búgva, ella ein er yvir 60 ár og bara eigur eini sethús, tvíhús ella raðhús í kommununi, og tað er har, ein er skrásettur at búgva
   c) Er ein ikki danskur ríkisborgari, skal ein hava havt skrásettan bústað í Føroyum í minsta lagi fimm ár tilsamans

## Lutakast

4. Rætturin til eina íbúð verður avgjørdur við lutakasti, sum verður framt við talgildari skipan. Lutakastið kann fara fram alment ella saman við tveimum óheftum eygleiðarum.

   Skilt verður ímillum fylgjandi bólkar av luttakarum í lutakastinum:
   a) Borgarar, sum hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu í seinasta lagi dagin áðrenn tilmeldingin verður lýst alment, og sum ikki eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til bústað

b) Borgarar, sum hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu í seinasta lagi dagin áðrenn tilmeldingin verður lýst alment, og sum bara eiga eina íbúð í Tórshavnar kommunu, og tað er har, viðkomandi er skrá settur at búgva.

c) Borgarar yvir 60 ár, sum hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu í seinasta lagi dagin áðrenn tilmeldingin verður lýst alment, og sum bara eiga eini sethús, tvíhús ella raðhús, og tað er har, viðkomandi er skrásettur at búgva.

## Raðfylgja

5. Lutakastið avger, í hvørjari raðfylgju luttakararnir sleppa at velja sær sína íbúð, soleiðis at:

   a) Fyrst sleppa tey í bólki 4a í tí raðfylgju, sum lutakastið avgjørdi at velja millum íbúðirnar, tey hava raðfest

   b) Næst sleppa tey í bólki 4b í tí raðfylgju, sum lutakastið avgjørdi at velja millum íbúðirnar, tey hava raðfest

   c) Síðst sleppa tey í bólki 4c í tí raðfylgju, sum lutakastið avgjørdi at velja millum íbúðirnar, tey hava raðfest

   Eru framvegis fleiri íbúðir tøkar, tá ið øll í bólki 4a, b og c hava fingið bjóðað íbúð, ella tí onkur letur sína íbúð inn aftur, kann byggiharrin loyva teimum, sum ynskja tað, at býta um við hesar íbúðir. Síðan kann kommunan skipa fyri nýggjari tilmelding, sum í mesta lagi er opin í tríggjar vikur eftir sama leisti sum omanfyri. Útvegar hetta ikki nóg nógvar keyparar, fær byggiharrin loyvi at selja íbúðirnar í fríari sølu.

   Samlaða úrslitið av lutakastinum verður sent øllum, ið hava teknað seg til lutakastið.

*Soleiðis samtykt á býráðsfundi tann 29. apríl 2025.*